## Blatter vil hava graslíki

Sepp Blatter, FIFA-forseti letur nú dyrnar upp fyri, at heimsmeistaraskapið í fótbólti, sum verður í Suður-Afrika í 2010 kann verða leikt á fjórða ættarliðs-graslíki. - Vit hava havt fleri fundir um hetta, men vit hava ikki tikið nakra endaliga avgerð, um HM í 2010 skal verða leikt á graslíki. Tað er uppá tíðina, at Afrika byrjar at hugsa um at nýta graslíkið, sigur Sepp Blatter. FIFA hevur stuðlað einari verkætlan, sum hevur lagt ein graslíkisvøll í hvørjum av teimum 53 afrikonsku limalondunum, Suður-Afrika undantikið.

## Arsenal fimm stig á odda

Arsenal eru nú fimm stig frammanfyri Manchester United í oddinum av Premier League, eftir at teir vunnu heimadystin móti Blackburn í kvøld. Úrslitið varð 2-0. Um vikuskiftið varð 26. umfar av Premier League spælt, og millum mongu úrslitini, hendi tað løgna, at Manchester City tóku øll á bóli og vunnu móti grannunum úr United. Hetta hevði so við sær, at Arsenal kundu gera sær sjálvum eina risa tænastu, við at vinna kvøldsins dyst, og tað var júst tað teir gjørdu. Emmanuel Adebayor, ið hevur staðið seg rættiliga væl í álopinum hjá Arsenal í ár, slapp eisini á máltalvuna í kvøld, men fyrsta málið átti verjuleikarin Philippe Senderos. Tað málið kom longu eftir bert fýra minuttum. Málið hjá Adebayor kom í yvirtíðini.

# Nýggjan vøll til 07 Vestur

**Undantaksloyvi til vøll við Formula-støði verður bert givið í eitt ár. Tí skal nýtt stadion helst standa klárt í 2010, um karmarnir skulu samsvara ítróttarligu málunum hjá 07 Vestur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Soleiðis verður nýggi leikvøllurin ímyndaður. Vøllurin skal liggja, har grótbrotið nú er*

Vágaportalurin skrivar, at Sandavágs kommuna arbeiðir itøkiliga við ætlanum um nýtt stadion í kommununi. Talan er um vøll fyri 10 mió kr., umframt eina tilhoyrandi høll, sum ætlandi skal kostra 15 mió kr.

Nýggj FSF-krøvini gera nevnliga, at vøllurin á Vallolyruni ikki lýkur ásetingarnar. Og undantak frá hesum verður bert givið í eitt ár. Við øðrum oyrum, so krevur tað, at arbeitt verður skjótt, um karmarnir skulu fylgja við teimum ítróttarligu málum, sum 07 Vestur hevur sett.

Ælandi skal felagið nevnliga spæla í Formula-deildini í 2009, og so má nýggi vøllurin standa klárur í 2010, um heimadystirnir tá framvegis skulu spælast í Vágoynni.

Við Vágaportalin sigur Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági, at tey hava sett 1,3 mió kr. av til planering av økinum, og at tað arbeiði skal gerast í ar.

Í vikuni hevði Sandavágs kommuna fund við Miðvágs kommunu og 07 Vestur. Seinni er ætlanin, at bjóða umboðum fyri Sørvágs, Vestmanna og Kvívíkar kommunu á fund.

# Torkil bergtikin í talvi

**Sætta Grand Prix kappingin í talvi varð avgreidd í vikuskiftinum á Oyrabakka. Heili 29 luttakarar høvdu leitað sær til eitt langt vikuskifti við talvi**

TALV
*Ólavur Simonsen*
*olavur@sosialurin.fo*



*Rógvi Dragaberg vann sína fyrstu Grand Prix kapping saman við Olafi Berg og Torkili Nielsen*

Fyrr var ógvuliga vanligt, at talvkappingar vóru longri enn eitt vikuskifti, men slíkar kappingar finnast næstan ikki longur í nútímans resinum. Talvfelagið Rókur hevur tó hildið fast í at skipa árligu Rókur-Open frá hósdegi til sunnudag. Hóast hetta nú er ein av longstu kappingunum í Føroyum, vóru nógvir íðnir luttakarar við.

### Torkil bergfastur

Torkil Nielsen hevur havt ein ómetaliga góðan endaspurt í Grand Prix kappingini. Á Oyrabakka gekk heldur ikki heilt av leið, tá hann endaði á einum fyrsta plássi millum Olaf Berg og Rógva Dragaberg. Torkil møtti Olafi í seinasta umfari, og ein sigur vildi givið Torkili leiðsluna í samlaðu støðuni í Grand Prix kappingini, um honum til vildar. Talvið endaði tó skjótt við javnleiki.

Rógvi Dragaberg hevði tá møguleikan at fara avstað við fyrsta plássinum einsamallur, men tók javnleik í vunnari støðu. Støðan hjá Rógva var tó ikki heilt vandaleys og við at taka javnleik, tryggjaði hann sær sín fyrsta sigur í Grand Prix høpi saman við Torkili og Olafi.

### NM unglingarnir merktu kappingina

Nú bert ein vika er eftir til norðurlandameistaraheitið í talvi fyri unglingar, lótu teir ungu ikki møguleikan gleppa sær úr hendi at brína vitið til komandi vikuskifti. NM kappingin er kend fyri at vera ein beinhørð kapping, har mangur telvari er komin aftur við tómari skjáttu. Talvsamband Føroya hevði tí valt at leggja hesa kappingina vikuskiftið áðrenn NM fyri at fáa unglingarnar í so góða venjing sum gjørligt, áðrenn tað stóra slagið.

### Oddastíðið harðnað

Munurin í oddinum í samlaðu kappingini er nú minkaður sera nógv. Av tí at Finnbjørn Vang og Ólavur Simonsen ikki luttóku í kappingini á Oyrabakka, fingu Torkil og Olaf fríar ræsur at taka seg inn á oddin, og tað gjørdu teir eisini.

Torkil tók seg fram um Finnbjørn, meðan Olaf liggur og lúrir á fjórða plássi. Havast skal í huga, at Olaf bert hevur telvað tríggjar kappingar, so ein sigur í næstu kapping kann geva honum fyrsta plássið í samlaðu støðuni.

Eftir átta kappingar verður finalan telvað. Síðan verður vinnarin funnin við at leggja úrslitini av seks teimum bestu kappingunum saman.

### Komandi kapping í Havn

Sjeynda Grand Prix kappingin verður skipað sum ein vikuskiftiskapping og verður telvað 22. – 24. februar í Havnar Telvingarfelag. Telvað verða langtalv, og kappingin verður ratað.

| Grand Prix 07/08 | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | HT | Kjølbro | KTF | ST | KT | Rókur | íalt |
| Ólavur Simonsen | 6,0 | 5,3 | 7,0 | 2,5 | 0,0 | 0,0 | 20,8 |
| Torkil Nielsen | 0,0 | 0,0 | 4,5 | 4,5 | 5,0 | 5,3 | 19,3 |
| Finnbjørn Vang | 6,0 | 5,3 | 0,3 | 2,5 | 2,0 | 0,0 | 16,1 |
| Olaf Berg | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 7,0 | 2,0 | 5,3 | 14,3 |
| Rógvi Dragaberg | 0,0 | 0,5 | 2,5 | 0,0 | 2,0 | 5,3 | 10,3 |
| Carl Eli N. Samuelsen | 3,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 7,0 | 0,0 | 10,0 |
| Herluf Hansen | 1,0 | 5,3 | 0,0 | 0,5 | 0,0 | 1,0 | 7,8 |
| Martin Poulsen | 0,0 | 0,0 | 4,5 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 4,5 |
| Jógvan Joensen | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 4,5 | 0,0 | 0,0 | 4,5 |
| Jón Andreasen | 4,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 4,0 |
| Rógvi E. Nielsen | 0,0 | 0,0 | 2,5 | 0,0 | 0,0 | 1,0 | 3,5 |
| Bogi Hansen | 0,0 | 2,5 | 0,3 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 2,8 |
| Vagn Heldarskarð | 0,0 | 2,5 | 0,3 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 2,8 |
| Andreas Andreasen | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 2,0 | 0,0 | 2,0 |
| Jens Chr. Hansen | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 2,0 | 0,0 | 2,0 |
| Terji Petersen | 2,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 2,0 |
| Jónfinn Thomsen | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 1,0 | 1,0 |
| Hans K. Simonsen | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 1,0 | 1,0 |
| Hjalti T. Jógvansson | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 1,0 | 1,0 |
| Høgni E. Nielsen | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 1,0 | 1,0 |
| Jaspur T. Gaard | 0,0 | 0,5 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,5 |
| Jón Gregersen | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,5 | 0,0 | 0,0 | 0,5 |